

Rasmus Hansson. Mynd: CF-Wesenberg

# Ikki nokk bara at leita eftir olju

**Jógvan Hugo Gardar**

25.08.2014 - 13:46

Oljan.fo

Oljumessan ONS er í Stavanger hesa vikuna, og norska stjórnin sendir fleiri av sínum ráðharrum til messuna, ið er tann týdningarmiklasta av hesum slagnum í Norðanlondum.

Borgarliga norska stjórnin ynskir at oljufeløgini gera tað tey eru ment at fáa fatur á olju og gassi sum tey hava funnið, og sum tað er møguligt at fáa hendur á.

- Hetta kann gerast størsta skeiva íløgan í norskari søgu, sigur Rasmus Hansson, ið situr á Stórtinginum fyri Tey Grønu.

Hann vísir á at nýggjar orkukeldur eru við at gerast størri enn samlaða orkan vit fáa frá olju og gassi.

- Bara í ár gera vit íløgur í olju og gass fyri meir enn 200 milliardir krónur meir enn í fjør. Hetta eru pengar sum missa sítt virði um heimsins lond semjast um eina klimaavtalu, sigur hann í samrøðu við Dagens Næringsliv.

Spurningurin er tó nær ein klimaavtala kemur uppá pláss. Í løtuni gongur hetta arbeiði spakuliga, men ætlanin er at tað skal vera liðugt í 2015, á einum fundi í Paris.

Rasmus Hansson, ið sjálvur hevur eina fortíð sum leiðari í norsku umhvørvisrørsluni, fær fyri ein part stuðul frá Thina Saltvedt, greinara hjá Nordea Markets.

- Eg eri samd í at nakrar av ætlanunum innan olju- og gassútvinning kunnu geva undirskot, men ikki allar. Serliga tá talan er um gass verður neyðugt at hava tað við fyri at vit kunnu nøkta komandi orkutørv í heiminum, sigur hon sambært tíðindastovuni NTB